

*Í Sumba var støðan hin umvenda. Her síggjast leikararnir takka áskoðarunum fyri stuðulin hesi trý árini, sum felagið hevur verið í fyrstu deild*

# Nú verða tað uppaftur fleiri um boðið

*Avrikið hjá vágbingum gevur smáum feløgunum trúnna uppá, at tað ber til at kappast við tey stóru*

Kappingarárið 2000 heima á landi er av. Einastu uppgávurnar, sum framvegis bíða, áðrenn síðstu fótbóltsskógvarnir verða settir á hillina, eru tvær landsliðsferðir. Onnur er tann hjá a–landsliðnum. Ferðalagið fer av landinum mikukvøldið, og málið er dystirnir, sum verða í Sveis komandi leygardag og í Jugoslavia annan mikudag.

Hin landsliðsferðin er tann hjá u–18 landsliðnum. Ungu menninir fara av landinum hósdagin. Teir skulu til Italia, har teir skulu taka lut í EM undankapping. Mótstøðulondini verða Italia, Ongland og Andorra. Talan verður um eina sera spennandi ferð og eina ógvuliga áhugaverda avbjóðing.

**Fagnaðir alla staðni**

HB fólkini harmast sjálvsagt um, at teirra lið ikki vann meistaraskapin. Men tey tóktust ikki so vónbrotin leygardagin, sum tey vóru tað næstsíðsta sunnudag, tá tey í evstu løtu mistu sigurin ímóti B36.

Toftamenn noyddust at ásanna, eftir at teir høvdu tapt í Vági, at teirra møguleiki var burtur. Leygardagin høvdu teir bronsuna at verja. B68 tapti ímóti GÍ, sum ikki hevur tapt á Svangaskarði síðani 1989. Á Toftum bíðaðu teir eina góða løtu, áðrenn bronsukrónurnar komu, men tað mundi kennast sum ein lætti, at tær komu. Hevði B36 vunnið í Gundadali, høvdu teir fingið Intertoto plássið.

Men B36 tapti. Vágbingar vunnu og stóðu tískil eftir sum stóru sigursharrarnir. Hevði Vágs bygd, sum teir nú nevna bý, verið á gosi eftir seytjanda umfarið, so var tað fyri einki at rokna aftur ímóti fagnaðinum, sum bygdafólkið sýndi VB leygardagin. VB bíðaði í 95 ár eftir fyrsta meistaraskapinum. Tí var tað ikki so undarligt, at fagnaðurin var øgiligur. Spælararnir sungu „ogur eru førjameistarør", viðhaldsfólkini norðanfjørðs høvdu lítlan hug at sleppa hetjunum, og móttøkan í Vági var, sum hon sømir seg.

Føroyski fótbóltsheimurin sum heild mundi unna VB meistaraskapin, og Ítróttarsosialurin ynskir VB og vágbingum hjartaliga tillukku við føroyameistaraskapinum. Tað er hugaligt, tá tey troðka seg fram, sum ongantíð hava verið á toppinum áður. Eitt nýtt felag og nýggir spælarar fara at royna seg í meistarakappingini í Europa Cup, og í VB vita teir, at ein millión fer at koma á konto – ivaleyst verður tað í Suðuroyar Sparikassa. Milliónin kemur ikki fyrrenn á sumri í 2002, men tað er trygd fyri, at hon fer at koma.

**Breiðari toppur**

At VB vann meistaraskapin boðar frá, at toppurin er vorðin breiðari, enn hann hevur verið frammanundan. Signalini til onnur feløg eru, at tað ber til at koppa stóru feløgunum av trónuni. Tað kennist ivaleyst hugaligt kring landið, og tað er einki at ivast í, at hetta fer at síggjast aftur í orkuni og huginum, sum komandi ár fer at verða lagdur í kappingina.

HB, KÍ og B36 fara ivaleyst aftur komandi ár at verða roknað millum favorittarnar, og tað kann væl vera, at eitt av hesum feløgunum fer at vinna. Men júst lokna kappingarárið hevur víst, at tað meiri enn so kann koma fyri, at okkurt annað felag fer at blanda seg. Nú mugu teir í Vági finna seg í, at teir komandi ár verða roknaðir millum favorittarnar. Hagtølini siga, at tað er ikki altíð so stuttligt.

Seinastu fýra árini hava GÍ, B36, HB og KÍ verið roknað sum favorittar at endurvinna meistaraskapin, men tað hevur kiksað hvørja ferð. Orsøkin hevur verið søgd at vera, at tað hevur verið torført at fáa spælararnar í tvey ár á rað at leggja ta orku í, sum skal til fyri at vinna meistaraskapin. Tað eru teir greiðir yvir í Vági.

VB er tíggjunda felagið, sum hevur vunnið meistaraskapin. Hini eru KÍ (17 FM), HB (15 FM), TB (7 FM), B36 (6 FM), GÍ (6 FM), B68 (3 FM), SÍ (1 FM), ÍF (1 FM), B71 (1 FM) og so var tað VB, sum leygardagin fekk fyrsta lutin í steypinum, ið Føroya Bjór í 1996 gav.

**Vágamenn í leysum lofti**

Í 1999 varðveittu sumbingar liðið í bestu deildini. Tað gjørdu teir ikki minst, tí tað eydnaðist teimum at vinna báðar dystirnar ímóti VB. Hesa ferð fingu teir einki stig frá VB.

Sumbingar hava í trý ár stíðst fyri lívinum. Teir hava í ár hildið seg havt betri fólk, enn teir onkuntíð áður hava havt áður, men úrtøkan var ov lítil. Sumba flutti niður í 1991. Tá tók tað teimum seks ár at koma aftur í fremstu røð.

Í triði síðsta umfarinum eydnaðist tað FS Vágum at vinna heimadystin ímóti B71 2–1. Tann sigurin vísti seg eftir 18. umfarið at vera alt avgerandi fyri beinleiðis niðurflytingina. Vágamenn spentu bogan høgt undan kappingarárinum. Tá teir fóru út um landoddarnar eftir fólki, ætlaðu teir sær meiri enn at stríðast fyri at varðveita plássið í bestu deildini. Um stríðið fer at eydnast, verður greitt, tá dystirnir ímóti ÍF eru avgreiddir.

Tað er greitt, at EB/Streymur komandi ár skal spæla í bestu deildini.

**jh**



*Í Gundadali kundu vágbingar fegnast um , at tað loksins er eydnast teimum at vinna meistaraheitið*



# Dysturin í Jugoslavia hongur í leysum lofti

*Jugoslavarnir hava ikki enn veitt føroysku pressuni visa. Um tað ikki eydnast at fáa loyvini í rættlag, fer FSF at lurta eftir, hvat FIFA hevur at siga, áðrenn nøkur avgerð verður tikin um ferðina*

Tað ber ikki til at gloppa fyri altjóða pressuni og eisini elektronisku fjølmiðlunum heima á landi, uttan at Jugoslavia er ovast á breddanum. Mikudagin í komandi viku skal føroyska landsliðið spæla HM undankappingardysti í Beograd. Ferðalagið fer úr Zürich í Sveis og til Beograd sunnudagin á middegi. Tað er henda sama dagin, at umvalið til forsetaembærið í Jugoslavia er dagsett.

Í altjóða samfelagnum er spenningurin stórur um, hvussu valið fer at spæla av. Tað verður mett at vera ikki so lítið sannlíkt, at ófriður fer at kykna upp í sambandi við valið. Sjálvsagt er hetta nakað, sum hevur sína ávirkan millum føroysku landsliðsspælararnar, sum fregnast og vilja vita, hvat FSF veit um støðuna og um dystin.

**Fluttu til Wien**

Ísak Mikladal er aðalskrivari í FSF. Tað er hann, sum hevur at gera við samskiftið við jugoslaviska fótbóltssambandið og við FIFA.

– Vit eru ikki heilt álvuligir við støðuna, men vit mugu rætta okkum eftir altjóða fótbóltssamgonguni FIFA. Teir geva ikki okkara landsliði loyvi at fara til Jugoslavia, uttan at teir kunnu veita trygd fyri ferðalagnum. Higartil hava vit einki hoyrt frá FIFA. Eg havi spurt meg fyri hjá teimum, men teir tykjast hava hug at bíða eitt sindur. Um teir seinni í vikuni fara at boða frá, at vit ikki kunnu fara til Jugoslavia, so verður næsti spurningurin, um dysturin skal spælast á uttanveltaðum vølli, ella um hann skal útsetast, sigur Ísak Mikladal, og hann heldur fram:

– Europeiska fótbóltssamgongan, UEFA, hevur ábyrgdina av Europa Cup. Í síðsta umfarinum gjørdu teir av, at Reyða Stjørnan, sum sendi KÍ úr kappingini, skuldi spæla sín heimadyst ímóti eingilska Leicester í Wien. Tað gjørdu teir, tí jugoslavarnir søgdu seg ikki vera førar fyri at veita trygd fyri áskoðarunum hjá eingilska felagnum. Teir í Leicester vildu ikki fara til Jugoslavia, um áskoðararnir hjá teimum ikki høvdu møguleika at fylgja sínum liði.

**Einki visa**

Fótbóltsssambandið hevur í góðari tíð biðið um visa fyri landsliðsferðalagnum og eisini fyri teimum seks pressuumboðunum, sum skulu við til Sveis og Jugoslavia. Jugoslavisku myndugleikarnir hava givið landsliðnum visa, men á middegi í gjár var einki visa komið til pressuna.

– Vit hava biðið jugoslaviska fótbóltssambandið um at gera sína ávirkan galdandi yvirfyri myndugleikunum, so okkara pressa kann fáa visa og harvið hava møguleika at fylgja við landsliðnum. Men vit hava einki hoyrt frá teimum. Um vit ikki hoyra frá teimum seinni í dag, fara vit at seta okkum í samband við FIFA fyri at fáa teir at gera sína ávirkan galdandi. Um føroyska pressan ikki fær visa til Jugoslavia, fer FSF at taka ferðina niður á Balkan til nýggja viðgerð. Hetta verður sjálvsagt gjørt í tøttum samstarvi við FIFA, sum eigur HM undankappingina, sigur Ísak Mikladal.

Atlantsflog fer í annaðkvøld at flúgva landsliðsferðalagið niður til Zürich. Sveisiska flogfelagið skal sambært løgdu ætlanini flúgva landsliðið til Beograd. Fleiri ferðafólk fara við landsliðnum til Sveis. Summi teirra skulu ferðast við Atlantsflog, meðan onkur onnur fara úr Danmark og til Sveis. Atlantsflog skipar ikki fyri áskoðaraferð til Beograd, og Fótbóltssambandið veitt ikki um nakran áskoðara, sum ætlar sær tann vegin.

Seks pressuumboð skulu saman við landsliðnum til Jugoslavia. Tað eru umboðini fyri Útvarp Føroya, Dimmalætting og Sosialin, sum FSF í gjár bíðaði eftir visa til.

JH



*Í løtuni tykist ivasamt, hvussu verður við dystinum millum Jugoslavia og Føroyar*

# Christian Høgni hevur fingið landsliðsboð

*Fróði Benjaminsen hevur givið avboð, og ungi álopsmaðurin er fyrsti NSÍ spælarin á landsliðshópinum í meiri enn trý ár*

Fróði Benjaminsen úr B68 hevur givið avboð til landsdystirnar, sum Føroyar skulu spæla í Sveis leygardagin og í Jugoslavia mikudagin. Fróði lærir til timburmann. Í løtuni gongur hann í tekniskan skúla. Sambært upplýsingum frá FSF ber tað ikki til hjá Fróða at vera burtur frá skúlanum í eina viku.

Í staðin fyri Fróða Benjaminsen hevur Allan Simonsen sent boð eftir Christian Høgna Jacobsen úr NSÍ. Ungi álopsmaðurin gongur á handilsskúlanum á Kambsdali, so nú fekk hann eina óvæntaða heystfrítíð í Sveis og Jugoslavia.

Christian Høgni Jacobsen er føddur 12. mai í 1980. Christian Høgni hevur áður verið á U–18 og U–16 landsliðunum. Hann hevur tískil áður kent rákan av altjóða fótbólti. Vit kunnu siga, at a–landsliðið nú fær ein spælara í hópin, sum umframt í felagnum hjá sær, eisini er mentur til altjóða uppgávur í miðvísa arbeiðnum, sum seinnu árini er gjørt á unglingalandsliðunum.

**Fáir úr NSÍ**

Hóast NSÍ tey seinastu árini hevur verið støðugt í bestu deildini, so hava teir ikki átt stóran lut á liðnum hjá Allani Simonsen. Higartil hava bara tveir NSÍ spælarar verið á landsliðnum, meðan teir hava spælt við NSÍ. Teir eru Jens Martin Knudsen, sum umboðaði NSÍ trettan ferðir á landsliðnum, og Djóni N. Joensen, sum var fýra ferðir á landsliðnum, áðrenn hann flutti úr barndómsfelagnum og í B36 (í ár hevur Djóni aftur spælt við NSÍ).

Seinast NSÍ hevði átti ein spælara í landsliðshópinum var í 1997. Í sambandi við heimadystin ímóti Malta 8. juni í 1997 sendi Allan Simonsen boð eftir Helga L. Petersen. Føroyar vunnu 2–1, og Helgi sat á beinkinum allar 90 minuttirnar. Aftaná gav Helgi avboð til onkra landsliðsferðina, og so vóru ikki boð eftir honum aftur.

Tá NSÍ rættuliga gjørdi um seg og eftir summarsteðgin vann á øllum oddaliðunum, var Christian Høgni Jacobsen ein av høvuðsleikarunum. Eftir at hann hevði verið skaddur mesta partin av fyrri hálvu, kom hann rættuliga fyri seg eftir summarsteðgin.

Christian Høgni er fyrst og femst álopsleikari. Men tað verður mett, at hann eisini kann verða eitt alternativ á vongveranum í høgru.

JH



*Christian Høgni var ein av høvuðsmonnunum, tá NSÍ í heyst gjørdi av øll trý oddaliðini*

# Henning fer til B1913

*Nýggju ásetingarnar í Danmark høvdu við sær, at tað ikki bar til hjá GÍ landsliðsmanninum at vera við ímóti B68*

Henning Jarnskor ætlar nú at royna fótbóltsevnini í næstbestu donsku deildini. Hann fer við landsliðnum til Sveis í annaðkvøld. Landsliðið flýgur beinleiðis til Sveis, og teir flúgva beinleiðis heimaftur eftir dystin í Jugoslavia annað mikukvøld. Tá kemur Henning Jarnskor heim við, men steðgurin verður heilt stuttur.

Henning Jarnskor hevur vant eitt sindur við B1913 í Odense, og hann ætlar sær at fara aftur hagar í aðru viku. Talan er ikki um yrkisfótbólt og yrkissáttmálar.

B1913 er í miðjuni í næstbestu deildini. Í vikuskiftinum vunnu teir 3–0 á útivølli ímóti FC Aarhus.

– Teir venja fýra ferðir um vikuna, men teir venja eitt sindur longri, enn vit í GÍ plaga at gera. Flestu spælararnir eru ungir. Um teir av álvara gera um seg, so kemur OB ella eitt annað av feløgunum í superliguni beinanvegin og bjóðar teimum sáttmála, sigur Henning Jarnskor. Hann kendi seg vælkomnan í B1913, og hann heldur ikki, at tað er ómøguligt hjá honum at stríða seg til eitt pláss á besta liðnum.

Orsøkin til at Henning ikki spældi á Svangaskarði leygardagin er, at nú siga ásetingarnar í Danmark, at tað er ikki loyvt hjá einum spælara, sum hevur verið við í síðsta umfarinum í einum øðrum landi, at flyta í donsku kappingina fyrrenn eftir 1. januar. Tað vil við øðrum orðum siga, at um Henning hevði spælt við GÍ leygardagin, so hevði hann ikki havt møguleika at spæla í Danmark fyrrenn eftir ársskiftið. Danska kappingin fer í vetrarfrí um miðjan november.

JH